UTTAN ÚR HEIMI

## Sjáldsom sjúka í Kanada

Teir seinastu dagarnar eru fýra fólk í kanadiska býnum Toronto deyð av einari sjáldsamari sjúku, sum nú hevur kravt tíggju mannalív teir seinastu átta dagarnar. .

Kanadisku heilsumyndugleikarnir viðganga, at teir vita ikki, hví fólkini eru deyð, og teir ásanna, at tað kann gerast sera trupult at fáa staðfest, hvat tað er fyri virus ella bakteria, sum hevur kostað teimum tíggju lívið. Kanningar hava víst, at talan er ikki um fuglakrím, SARS ella legionella. Fleiri av líkunum eru vorðin kannað, men higartil uttan úrslit.

Sjúkan tók seg upp á einum røktarheimi í síðstu viku, og kanningar hava staðfest, at 84 fólk eru smittað. Tey flestu vóru røktarsjúklingar, men fleiri starvsfólk og fólk, um vóru komin at vitja avvarðandi, eru eisini smittað. 40 av teimum smittaðu liggja á sjúkrahúsi, sigur heilsustjórin í Toronto, Davin McKeown, við tíðindastovuna AP.

## Fleiri hermenn til Afghanistan

NATO ætlar at senda 6.000 hermenn afturat til Afghanistan eftir ársskiftið, tí tá skal samgongan eisini hava eftirlit við tí syðra partinum av landinum. Frammanundan eru 9.000 NATO-hermenn í Afghanistan.

Sum er hava teir útlendsku hermenninir eftirlit við høvuðsstaðnum Kabul og teimum norðaru landspørtunum. Men eftir nýggjár skulu teir eisini hava eftirlit við teimum syðru landspørtunum, har bólkar hjá Taliban framvegis gera um seg, og tað verða yvirhøvur hermenn úr Bretlandi, Kanada og Niðurlondum, sum skulu hava støð har, skrivar AP.

Fleiri av teimum evropeisku NATO-londunum sýta fyri at lata hermenn sínar taka lut í bardøgunum ímillum teir 20.000 amerikonsku hermenninar og uppreistrarmenninar, men sambært Jaap de Hoop Scheffer, NATO-aðalskrivara arbeiðir samgongan við at finna eina loysn á hesum trupulleikanum.

Sum skilst hava summi lond hug at slaka og at lata sínar hermenn verða við í eftirlitinum í teimum ófriðarligu landspørtunum har suðuri í landinum.

## Amerikanarar viga ov nógv

Amerikanskir granskarar siga, at 90 prosent av teimum amerikonsku monnunum viga ov nógv.

Tey seinastu 30 árini hava granskarar í Boston hildið eygað við 4.000 fólkum í statinum Massachusetts, og tey hava javnan verið til kanningar. Úrslitið vísir, at sjálvt um tey flestu viga á leið tað, tey skulu, tá tey koma upp í árini, so tyngjast tey kortini seinni og viga tá ov nógv.

Tann vanliga uppfatanin hevur verið, at tveir triðingar av øllum amerikanarunum viga ov nógv, men kannigin í Massachusetts bendir á, at støðan er munandi verri enn so. Sambært teimum viga 90 prosent av teimum amerikonsku monnunum ov nógv, meðan 70 prosent av kvinnunum eru í tyngra lagi.

## Onga útbúgving

Í setanarrøðuni í Fólkatinginum fyrradagin segði Anders Fogh Rasmussen, forsætisráðharri, at allir ungir danir skulu fáa sær eina útbúgving, tá teir eru lidnir við fólkaskúlan.

Men sambært blaðnum metroXpress er langt á mál, tí hagtølini vísa, at sjálvt um 95 prosent av teimum ungu fara undir onkra útbúgving aftan á fólkaskúlan, so eru tað minni enn so øll, sum fullføra útbúgvingina. Nýggj tøl vísa, at sætti hvør dani fær onga útbúgving.

-Helmingurin gevst, tí tey verða happað, ella tí tey tíma ikki at ganga í skúla, og altsamt fleiri og fleiri tíma hvørki í studentaskúla ella at fáa sær eina vinnuliga útbúgving, sigur Ulla Højmark Jensen, sum hewvur verið við til at kanna, hví so mong ung í Danmark ikki fáa eina útbúgving.



*Tropiska ódnin "Stan" hevur karvt umleið 70 mannalív í teimum miðamerikonsku londunum teir seinastu dagarnar, og í Fjarsystri hevur ein melduródn kravt uppaftur fleiri mannalív*

# Kunnleiki kann avmarka náttúruvanlukkur

Reyði Krossur heldur, at vantandi kunning var ein stór orsøk til, at flóðaldan í Suðurasia og ódnin "Katrina" kravdu so mong mannalív.

NÁTTÚRUVANLUKKUR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Nógvar náttúruvanlukkur høvdu kravt munandi færri mannalív, um kunningin og samskiftið høvdu verið betur skipað. Tað sigur altjóða Reyði Krossur í einari frágreiðing, sum bleiv almannakunngjørd í gjár. Frágreiðingin snýr seg um flóðalduna í Suðurasia í fjør, hungursneyðina í Niger og ódnina "Katrinu" í USA, og niðurstøðan er, at kunningin sveik í øllum trimum førunum.

Reyði Krossur sigur, at hvørki serfrøðin, myndugleikar ella fjølmiðlar gjørdu nóg mikið fyri at kunna fólk um vandan. Eitt nú vistu serfrøðingar, at ein flóðalda var á veg ímóti landi, men teir vistu ikki, hvussu teir skuldu kunna fólk um tað. Amerikanskir myndugleikar vistu, at "Katrina" fór at elva til stóra vatnflóð í New Orleans, men tað vistu tey fátæku í økinum ikki, sigur Reyði Krossur.

Felagsskapurin vísir eisini á, at aftan á sjálva vanlukkuna var samskiftið ímillum myndugleikar, hjálparfólk og tey raktu alt ov illa skipað. Eitt nú verður víst á, at í Aceh-landspartinum í Indonesia vóru hjálparfelagsskapir ikki serliga sinnaðir til at geva hvør øðrum og ST upplýsingar um støðuna. Tað hevði millum annað við sær, at fleiri vistu ikki, hvør hjálp var neyðug.

Kunning og samskifti kunnu vera avgerandi fyri, um ella hvussu mong mannalív ein náttúruvanlukka krevur. Tað er ov seint, tá myndatólini hava fingið tær fyrstu myndirnar av vanlukkuni.

Í summum londum, sum javnan verða rakt av náttúruvanlukkum, hava myndugleikarnir gjørt skipanir, sum skulu kunna fólk um vandan. Hetta er millum annað galdandi í Kuba og í Jamaica, har tilbúgvingin er ein partur av læruni í barnaskúlanum.

-Royndirnar í hesum londunum vísa, at tær nýtist ikki at vera væl fyri fíggjarliga fyri at vera fyrireikaður, men at tað er umráðandi, at tú hevur fingið tann neyðuga kunnleikan, siogur Gahr Støre, sum er aðalskrivari í norska Reyða Krossi, við Aftenposten.

# Putin bjóðar Evropa russiska olju

**Men afturfyri skulu russar fáa lættari atgongd til Evropa**

RUSSLAND

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Russland hevur so nógva olju, at landið kann nøkta ein triðing av nýtsluni í øllum Evropa, og russar eru eisini sinnaðir at lata evropearunum oljuna.

- Vit økja framleiðsluna alla tíðina og hjálpa sostatt heimsbúskapinum. Uttan ta russisku oljuna hevði prísurin verið munandi hægri, enn har er, segði Vladimir Putin, forseti, á tíðindafundi í London fyrradagin. Hann legði afturat, at tann russiska oljan kann tryggja evropearunum meiri støðugan oljuprís, men at russar mugu fáa okkurt afturfyri.

Á fundionum kom fram, at Russland er sinnað at taka ímóti teimum russarunum, sum hava sníkt seg ólógliga inn í ES. Afturfyri hevur ES lovað at gera tað lættari hjá russum at ferðast til ellivu ávís ES-lond. Talan er serliga um russisk lesandi, diplomatar og vinnulívsfólk.